

# TØKK

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og umsorgan, tá okkara høgt elskaði maður, pápi, sonur, verfaðir, abbi og bróðir

**Regin Olsen**
**Tórshavn**

andaðist og fór heim til Harran

Hjartaliga tøkk til tykkum, sum vóru um hann á Lágargarði og á Landssjúkrahúsinum.
Tøkk til Derhard Jógvansson, prest, og Bergur Debes Joensen, prest, fyri góð og troystarrík orð í kapellinum, kirkjuni og á grøvini. Tøkk til Jensinu Olsen og Argjakórið fyri yndisligan sang. Tøkk til kirkjutænarar, berarar, sangarar og organistar. Tøkk til tykkum, ið á ein hvønn hátt hjálptu so væl til við ervinum. Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir, vitjanir og peningargávur til Meinigheidshúsið í Havn.
Hjartaliga tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.

***Vegna tey avvarðandi***
**Hella**
**Niels Juel, Liljan og Randi Jensina**

*Luk. 23,43 Og hann segði við hann: Sanniliga sigi eg tær, í dag skalt tú vera við í Paradís*



# TØKK

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá góða mamma, vermamma, omma, langomma og systir okkara

**Helena Stenberg**
**ættað úr Sumba**
**búsitandi í Trongisvági**

andaðist og varð jarðað.

Ein serlig takk til heimahjálparar, heimasjúkrasystrar, kommunulækna og starvsfólk á Suðuroyar sjúkrahúsi fyri umsorgan og hjálpsemi.

Takk til Jónsvein Bech, prest, fyri góð og troystarrík orð. Eisini takka vit sangarum, kirkjutænarum, urguleikara og gravara.

Takk til tykkum øll, ið hjálptu so væl til við ervinum. Takk fyri kransar, blómur, heilsanir og peningagávur til Meinigheitshúsið í Vági.

Takk tit øll, ið fylgdu mammu til hennara seinasta hvíldarstað.

***Familjunnar vegna***
**Aksel, Karin Maria, Ingunn og Ellenor**



# Takk

Eg vil takka øllum, ið gjørdu 30 ára føðingardagsveitsluna hjá mær 12. mars so góða og minnisríka.
Takk til familju, vinir og kenningar fyri hjálp til matgerð o.a.
Takk fyri gávur og heilsanir. Ein serstøk tøkk til øll í Frelsunarherinum – ikki minst til Jonu, Súsonnu og Sólvu í køkinum.
Eisini ein serstøk tøkk til Teddy Petersen, Streingjakórið og Manskórið, sum vaktu miklan ans til hvønn einstakan við góðum sangi.

Eg vil hervið ynskja tykkum alt gott fram yvir við ynskjum um einar gleðiligar páskir.

**Niels Heðin**
*Hoyvík*

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæra kona, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Jona Dahl**
**Á Oyri**
**ættað úr Haldórsvík**

andaðist týsdagin 12. apríl.

Farið verður av Mørkini fríggjadagin kl. 19.00 í Norðskála kirkju.
Jarðarferðin verður frá kirkjuni við Norðskála leygardagin kl. 14.00.

***Vegna famijuna***
**Esmar**

Tey, ið vilja minnast Jonu, kunnu lata kirkjuna við Norðskála eina gávu, konta í peningastovninum.

# 85 % kunnu hoyra Lindina

Leygardagin millum klokkan 14 og 23 fer útvarpsrásin Lindin enn einaferð at hava stuðulsdag.

21. januar í ár vóru 11 ár liðin, síðani Lindin byrjaði at senda. Lindin hevur øll hesi árini fíggjarliga verið hildin uppi við føstum stuðlum og gávum, og sigast má, at var tað ikki fyri tann kærleika, ið trúføstu gevararnir vísa Lindini, bar als ikki til á hendan hátt at senda kristiligu sendingarnar alt samdøgrið.

- Øll hesi árini hevur Lindin verið í støðugari menning, og hettar kostar pengar. Bæði tíðarinnar tonn og økingin í sendineti og sendiflatu ger, at tað alsamt er tørvur á enn fleiri stuðlum. Tann tekniski parturin av Lindini er lutvíst niðurslitin, og hetta krevur støðugar ábøtur, upplýsir dagligi leiðarin, Tór Arni Samuelsen.

Tí verður enn einaferð skipað fyri stuðulsdegi í Lindini, har Jenis av Rana, Preben Hansen, Absalon Áargarð, Erna Háberg, Sólrun Poulsen, Símun Hansen, Sólbjørg Zachariassen og Tór Arni Samuelsen fara at sita í útvarpsstovuni. Prátað verður við ymiskar gestir, bæði nær og fjar.

Høvið verður hjá lurtarum at tekna seg sum stuðul ella at geva Lindini eina gávu. Í sendingini verður lutakast um góðar vinningar - m.a. ferð fyri tvey til Ísraels og flogferðir. Drigið verður bæði millum nýggjar og verandi stuðlar. Lutakast verður gjøgnum dagin, og kl. 23.00 verður drigið um høvuðsvinningin, sum er ein ferð fyri 2 til Ísraels.

Umleið 50 fólk eru á ein ella annan hátt virkin í Lindini og av teimum virka flestu sjálvboðin.

Lindin verður sum nevnt fíggjað við gávum frá stuðlum, privatum og virkjum. Flestu stuðlarnir gjalda eina ávísa upphædd um mánaðin, samanlagt javnvigar fíggjarliga við áleið 1.4 mió. árliga.

Lindin hevur í dag 11 sendarar og vit røkka til uml. 85 % av føroya fólki.

